**Fuglafjarðar kommuna**

530 Fuglafjørður · Føroyar · Tlf. 737700 · Telefax 444657/444647

**Vinnumálaráðið**
Tinganes
100 Tórshavn

J.nr.: F.K. 00-52-019
Dato: 22. juli 2008
Okkara ref. SSS/JFL
E-postur: fko@fuglafjordur.fo
Heimasíða: www.fuglafjordur.fo

**Umsókn um tunnilsgerð av Kambsdali-Millum Fjarða.**

Fuglafjarðar býráð hevur á fundi tann 26. juni 2008 samtykt at heita á háttvirda Føroya landsstýri/Føroya løgting um at fremja tunnilsgerðina av Kambsdali- Skálabotn (Millum Fjarða) skjótast við at gera ein umleið 2.300 metra langan ferðslutunnil, sum lýstur varð í umsókn kommununar til Vinnumálaráðið/Løgtingið við skrivi, dagfestum 17. januar 2007.

Víst verður í hesum sambandi til nýggjastu "Samferðsluætlanina" 2008 til 2020, har hesin tunnil eystur-vestur er tikin við sum ein av ætlaðu samferðsluíløgunum í landinum, men grundað á tað nógvu og serliga tungu ferðslu, sum dagliga kemur og fer úr Fuglafirði, so heitir ráðið á avvarðandi myndugleikar, um at raðfesta hesa íløgu sera frammarlaga, tá ið talan eisini er um eina íløgu, sum sambært costbenefit kanningum verður mett sum ein burðardygg samfelagsíløga.

Somuleiðis verður eisini víst á, at í samferðsluætlanini, verður eitt nú flutningur til og úr skúlum eisini roknaður við. Til hesi viðurskifti skal verða upplýst, at nógvir næmingar verða fluttir til miðnámsskúlarnar á Kambsdali hvønn yrkadag, somuleiðis sum mong arbeiðspláss, sum eisini verða nýtt sum grundarlag bæði eru í Fuglafirði og eisini á Kambsdali, sí viðmerkingar.

Um so skuldi verið, at Føroya løgting ikki kemur at fremja hesa neyðugu tunnilsíløgu sum eina landsíløgu í infrakervið sum eina av teimum fyrstu tunnilsíløgum, so loyvir kommunan sær sum *Alt II* aftur at heita á avvarðandi myndugleikar um at:

Fáa loyvi at nýta sama bygnað og fíggjarliga leist, sum nýttur verður í sambandi við Skálafjarðatunnilin, tað vil siga at eitt partafelag skal eiga og reka Kambsdalstunnilin", tá ið komið er so langt áleiðis, somuleiðis sum eisini í hesum sambandi verur biðið um loyvi til:

1. At linjuføringin verður áleið, sum víst á hjálagda kortskjali nr. 2.
2. At binda tunnilin í landsvegakervið báðumegin tunnilsmunnarnar.
3. At krevja upp bummgjøld fyri øll akfør, ið koma at nýta tunnilin.

Hjáløgd verður send hesi skjøl:

- Umsókn um tunnilsgerð, dagfest 17. januar 2007.
- Svarskriv frá Vinnumálaráðnum, dagfest 05. juli 2007.



info@fuglafjordur.fo · www.fuglafjordur.fo

- Kort.
- Nýggjar viðmerkingar til málið.

Annars kemur kommuna beint eftir summarfrítíðina at senda Vinnumálaráðnum skriv frá vinnuni, stovnum og miðnámsskúlum í kommununi, har hesir boðað frá, at tikið verður fult og heilt undir við áheitan kommununar um tunnilsgerð av Kamsbdali í Skálabotn.

Annars eru umboð fyri kommununa altíð tilreiðar at koma á fund við Vinnumálaráðið fyri at lýsa málið nærri, eitt nú við undirbyggjandi skjalatilfari.

***Avrit av hesum skrivi er sent***: Føroya løgtingi og Landsverk.

Vinarligar heilsanir

Sigurð S. Simonsen
borgarstjóri

// Jákup Frants Larsen
býráðsskrivari